# Katla



Katla er ein lutvíst nýggjur føroyskur bólkur, ið spælir frumskrivaðan instrumentalan tónleik. Katla framførir jazz-kendan tónleik, ið fevnir um alt frá sveimandi ljóðmyndum til tango, gospel og livandi jazz. Tað er keyboardmaðurin í bólkinum, Magnus Johannessen, sum hevur skrivað allan tónleikin. Hann hevur áður útgivið tónleik við bólkum sum Plúmm og Greengate. Bólkurin hevur seinasta hálva árið verið fastur bólkur til jazzkvøldini, sum eru týskvøld á Hvonn. Hesi kvøld hava verið sera væl vitjað, og framførslurnar hava verið sera væl móttiknar - bæði av ungum sum eldri. Katla er sprottin úr bólkinum "trio Magnussar", og hann var fyrsti jazz bólkur, sum var boðin at luttaka á eini Ólavssøkukonsert. Hetta var til tiltakið "Futt í Býin" sum var í juli 2008.

**Luttakandi tónleikarar í Katla:**
Magnus Johannessen, Piano, Keyboards og Harmonika.
Rógvi á Rógvu, Trummur og Percussion
Edvard N. Debess, Bass
Ólavur Olsen, Trompet, Flygelhorn og Eb horn
Haukur Grøndal, Saxofon og klarinett



Tórshavnar Kirkja er eisini við á festivalinum

# Hans Jacob Kollslíð og Kári Sverrisson við bólki

Hans Jacob Kollslíð og Kári Sverrisson, ið góvu fløguna "Dreymaspøl" út stutt fyri jól, verða eisini at hoyra henda leygardagin. Saman við Óla Olsen, Brandi Jacobsen og Mikael Blak, ið spæla við á fløguni, og Heðini Ziska Davidsen fara teir at framføra eitt úrval av løgum av fløguni. Hetta eru løg, teir hava gjørt saman og hvør sær til yrkingar hjá Hans Jacob Kollslíð, Christiani Matras og yrkjarunum Li Po, Wang Wei og øðrum úr sonevndu T'ang tíðini í Kina, ið var fyri eini 1200 árum síðani. Framførslan hjá Hans Jacob, Kára og bólkinum verður í Miðlahúsinum umleið klokkan 18.

# TJANT



Tjant er ein tónlistarlig verkætlan, ið er grundað á komposisiónirnar hjá føroyska komponistinum Heðin Ziska Davidsen. Heðin varð føddur í 1977, og hevur fingist við tónleik síðani 1995. Hann hevur spælt bæði metal og rokk tónleik, umframt etniskan jazz. Fyrsta fløgan hjá Tjant, sum er uppkallað eftir bólkinum, kom út í 2003 frá plátufelagnum Tutl. Á henni var Anders Hagberg at hoyra á saxofon og floytu, Mikael Blak spældi bass, Brandur Jacobsen spældi trummur og Heðin spældi gittar. Onnur útgávan, "A Beam Of Light", er um at verða liðug og verður úti innan alt ov leingi. Á henni verður manningin tann sama, tó undantikið Ólavur Olsen, ið fer at spæla trompet ístaðin fyri Anders Hagberg. Ímillum bólkarnar, ið Heðin hevur spælt við í gjøggnum árini, eru millum annað metal bólkurin Hatespeech, fólkabólkurin Enekk, etniski jass bólkurin Yggdrasil, etniski jass bólkurin A Wizards Journey, fólkasangarin Kristleif Zachariassen og rokkbólkurin Marius, bert fyri at nevna nakrar. Ímillum tónleikararnar, ið Heðin hevur spælt saman við eru Kristian Blak, Anders Hagberg, John Tchicai, Villu Veski, Anders Jormin, Eivør Pállsdóttir, Kári Sverrison, Óli Olsen, Arnold Ludvig, Tore Brunborg, Karin Korpelainen, Karsten Vogel, og mong onnur.

**Manningin:**
Heðin Ziska Davidsen, gittar
Ólavur Olsen, trompet
Heini Ragnarsson, trompet
Atli Petersen, trombon
Mikael Blak, bass
Brandur Jacobsen, trummur